Fólkaheilsuráðið

# Better life index 2020/21

Ein kanning eftir leisti hjá OECD Better Life og Gallup World Poll

---



# Innihald


Hvussu er lívið? ........ 3
Um kanningina ........ 3
Háttalag ........ 3
Høvuðsniðurstøður í frágreiðingini ........ 4
Indikator 1: Býli ........ 6
Indikator 2 – Inntøkur ........ 9
Indikator 3 – Arbeiði ........ 11
Indikator 4 – Sosial netverk ........ 14
Indikator 5 Útbúgving ........ 16
Indikator 6 Umhvørvi ........ 19
Indikator 7 Samfelagsluttøka ........ 22
Indikator 8 Heilsa ........ 24
Indikator 9 Lívsnøgdsemi ........ 27
Indikator 10 Tryggleiki ........ 29
Indikator 11 Arbeiði og frítíð javnvág ........ 31
Samanhangir ........ 33
Fylgiskjal ........ 36

# Hvussu er lívið?

Hetta spyr OECD[1] í kanning síni Better Life, har farið verður afturum vanligu mátingarnar fyri vælferð, og har vanligi borgarin eisini verður eftirspurdur. Í hesum riti hava vit funnið fram ymisk hagtøl fyri Føroyar, sum samsvara við hagtøl í OECD kanningini, og vit hava eisini á sama hátt sum OECD spurt føroyingar, hvussu teir hava tað, og hvussu teirra fatan av gerandisdegnum, heilsuni og framtíðini er.

# Um kanningina

Í Better Life kanningini hjá OECD eru umframt OECD londini eisini nakrir stórir búskapir, sum ikki eru partar av OECD (Russland, Brasilia og Suður Afrika). Tilsamans 41 lond. Henda kanning varð fyrstu ferð framd í mai 2010, tá OECD hevði sín 50 ára føðingardag, har funnið varð fram til nøkur mynstur og rák fyri tí góða lívinum. Tað góða lívið er sambært OECD annað og meira enn bert búskapur og inntøka. Seinastu ferð kanningin varð framd var í 2020 áðrenn Covid-19. Og (flestu) føroysku tølini eru eisini savnað fyri Covid-19 farsóttin veruliga ávirkaði heimin frá mars 2020.

Better Life kanningin hjá OECD fatar um 11 øki:

1. Býli/Housing
2. Inntøka/Income
3. Arbeiði/Jobs
4. Samfelag/Community
5. Útbúgving/Education
6. Umhvørvi/Environment
7. Samfelagsluttøka/Civic Engagement
8. Heilsa/Health
9. Lívsnøgdsemi/Life Satisfaction
10. Tryggleiki/Safety
11. Javnvág millum arbeiði og frítíð/Work-Life Balance

Fyri at fáa greiði á hesum 11 økjum, eru nógvar ymiskar hagtalsupplýsingar savnaðar inn fyri hvørt landið, íalt 24 hagtøl/spurningar. Fyri Føroyar ber ikki til at fáa øll hesi tøl til vega, men hetta er eisini galdandi fyri fleiri onnur lond í OECD. Fyri Føroyar hevur tað eydnast at fáa hendur á 17 av teimum 24 hagtølunum.

# Háttalag

Ein kelda til kanningina er ein spurnarkanning kallað Gallup World Poll, sum Fólkaheilsuráðið hevur fingið til vega gjøgnum Gallup Føroyar, har gott 500 fólk eru spurd. Hendan kanning varð gjørd í februar 2020. Hetta er samsvarandi OECD, sum eisini ger nýtslu av Gallup World Poll. Gallup World Poll er ein kanning, sum í flestu londum í heiminum verður gjørd eina ferð um árið, og í ávísum londum sum í Japan, Týsklandi og USA verður gjørd 4 ferðir um árið. Vanliga verða millum 500 og 1000 fólk spurd í hvørjum landi. Kanningin er grundað á vanligt spurnarblað, sum er orðað av leiðandi serfrøðingum á økinum. Gallup World Poll inniheldur nógvar spurningar, men sjálv kjarnan av spurningum verður spurd í øllum londum. Henda kjarna inniheldur sosioøkonomiskar spurningar, spurningar um sosialt tilknýti og nøgdsemi við til dømis livistøði. Eisini verða spurningar um subjektivt lívsnøgdsemi spurdir.

[1] OECD (Organisation of Economic Cooperation and Development) er ein samgonga við teimum ríkastu londunum í heiminum.

Umframt spurnarkanning verða hagtøl eisini funnin fram í øllum londunum. Í Føroyum vórðu hesi hagtøl funnin m.a. frá hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya, hjá Umhvørvisstovuni, ALS og Landslæknanum. Av tí at vit ikki funnu øll hagtølini spurt varð um, varð gjørd ein Gallup kanning afturat til tvey av hagtølunum.

Tá hvør parametur verður funnin í Better Life kanningini, skal hann kunna samanberast við tølini fyri hini londini í kanningin. Fyri at tølini skulu kunna samanberast, verða øll tølini sett inn á sama hátt. Hetta verður gjørt við at seta 'besta' landið til 10 point og 'ringasta' landið til 0 point og so hini londini lutfalsliga inn ímillum her. Frymilin fyri at finna hesi virði er hesin:

Frymil 1

$$\textit{Virði} = (\textit{títt tal} - \textit{minimum tal})/(\textit{maksimum tal} - \textit{minimum tal}) * 10$$

Um vit taka eitt dømi um miðal livialdur, so hava vit ein miðal livialdur í Føroyum á 83,1 ár, og tann hægsti livialdurin er í Japan við 84,1 árum, og tann lægsti livialdurin er í Suður Afrika við 57,5 árum. Okkara parametur verður so roknaður sum: (83,1 – 57,5)/(84,1 – 57,5)*10 = 9,6 fyri miðal livialdur. Er 'best' at vera í lægra endanum (eitt nú arbeiðsloysi), so verður talið omanfyri drigið frá 10, so landið við tí lægsta t.d. arbeiðsloysinum fær 10.

Ofta skulu fleiri parametrar til at finna tann samlaða felagsindikatorin fyri økið. Tá verður eitt miðaltal funnið fyri hesar parametrarnar. Har eru ímillum ein og fýra parametrar fyri hvørt av 11 økjunum omanfyri. Íalt skulu sum sagt 24 parametrar til at finna teir 11 felagsindikatorarnir.

# Høvuðsniðurstøður í frágreiðingini

Seinasta kanning, sum varð framd í 2017 vísti, at Føroyar var millum heimsins bestu lond at liva í. Og hetta er niðurstøðan aftur hesaferð. OECD er tó varið við at gera slíka niðurstøðu, tí eftir teirra meting er tað upp til tann einstaka at gera av, hvat fyri indikator ein leggur mest dent á. Sum eitt dømi kann nevnast, at Føroyar fáa mest stig, um øll økini eru vektað eins, men innan útbúgving, inntøku og javnvág millum arbeiðslív og frítíð eru vit ikki millum fremstu lond í OECD.

Høvuðsúrslitini fyri Føroyar síggja í 2013, 2017 og 2020 soleiðis út:

| | Miðal indikator | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2013 | 2017 | 2020 | 2013 | 2017 | 2020 |
| Býli | 8,1 | 8,5 | 9,1 | 1 | 1 | 1 |
| Inntøkur | 6 | 5,6 | 4,2 | 15 | 7 | 15 |
| Arbeiði | 8,2 | 9,1 | 9,9 | 3 | 3 | 1 |
| Netverk | 9,6 | 8,8 | 9,5 | 6 | 3 | 2 |
| Útbúgving | 4,7 | 6,1 | 6,8 | 31 | 28 | 21 |
| Umhvørvi | 9,6 | 9,8 | 8,9 | 2 | 2 | 3 |
| Samfelagsluttøka | 10 | 9,1 | 9,7 | 1 | 1 | 1 |
| Heilsa | 9,2 | 8,9 | 9,2 | 3 | 7 | 5 |
| Nøgdsemi | 10 | 10 | 10,0 | 1 | 1 | 1 |
| Tryggleiki | 10 | 9,7 | 10,0 | 1 | 1 | 1 |
| Arbeiðslív/frítíð | - | - | 8,6 | | | 10 |
| | 8,5 | 8,6 | 8,7 | 1 | 1 | 1 |

**Talva 1 Samlað yvirlit fyri allar indikatorar fyri Føroyar**

Eins og í seinastu kanning, so liggja Føroyar hægst innan 4 øki, sum eru tey somu hesaferð, men harafturat eru Føroyar eisini hægst innan økið ‘arbeiði’ hesaferð. Vit hava tó hesaferð fingið nøkur tøl innan arbeiðslív og frítíð, sum siga, at vit eru á næstaftasta plássi í mun til hini londini, tá talan er um hendan indikatorin. Í talvu 2 er ein samanbering við okkara grannalond, um nú Føroyar var við í kanningini fyri 2020, og Føroyar eru í miðal frammanfyri grannalondini. Noreg er annars landið við tí hægsta miðal indikatorinum – um allir indikatorar taldu líka – í uppruna rapportini frá OECD.

| | Føroyar | Danmark | Noreg | Ísland |
|---|---|---|---|---|
| Býli | 9,1 | 6,2 | 8,4 | 5,3 |
| Inntøkur | 4,2 | 2,6 | 4,5 | 5,9 |
| Arbeiði | 9,9 | 8,1 | 7,9 | 9,8 |
| Netverk | 9,5 | 8,5 | 8,0 | 10,0 |
| Útbúgving | 6,8 | 7,9 | 7,4 | 6,8 |
| Umhvørvi | 8,9 | 8,3 | 9,5 | 10,0 |
| Samfelagsluttøka | 9,7 | 6,4 | 6,0 | 5,9 |
| Heilsa | 9,2 | 7,9 | 8,7 | 8,6 |
| Nøgdsemi | 10,0 | 9,1 | 9,1 | 8,8 |
| Tryggleiki | 10,0 | 8,9 | 9,4 | 9,1 |
| Arbeiðslív/frítíð | 8,6 | 8,6 | 7,8 | 5,5 |
| **Samlað** | **8,7** | **7,5** | **7,9** | **7,8** |

**Talva 2 Samanbering við grannalondini**

Henda talvan er eisini víst sum ein mynd á forsíðuni av hesari frágreiðing. Samlaða úrslitið fyri øll OECD londini um Føroyar var við í mynd 1, har svarti prikkurin vísir, hvar Føroyar var í seinastu kanning í 2017. Í komandi kapitlunum verður greitt frá, hvørjum indikator sær og hagtølunum fyri Føroyar samanborið við OECD londini.




*Mynd 1 Miðal fyri allar indikatorar. Kelda: OECD Better Life og egnar útrokningar.*

Í komandi kapitlunum verður greitt frá, hvørjum indikator sær og hagtølunum fyri Føroyar samanborið við OECD londini.

# Indikator 1: Býli

*Øll hava rætt til hóskandi býli, sigur OECD. Eitt hóskandi býli er meiri enn bert fýra veggir og eitt tak.*

*Okkara hús og heim hava stóran týdning fyri okkara materiella livistøði. Tað er umráðandi, at vit fáa okkara grundleggjandi tørv nøktaðan so sum at vera undir taki, eru fjálg, verða vard móti vindi og regni og kenna okkum trygg innanfyri fýra veggirnar í heiminum. Eisini at vit kenna, at vit hava okkara persónliga rúm. Eitt gott býli hevur stóran týdning fyri okkara heilsu, og fyri menningina hjá okkara børnum. Harafturat er okkara heim týdningarmikið fyri okkara grundleggjandi tørv at hava eina familju.*

*Hesin kapittul greiðir frá býlisumstøðunum gjøgnum nakrar indikatorar, har vit hyggja eftir, hvussu nógv pláss vit hava at búgva í, í hvønn mun vit hava atgongd til grundleggjandi saniterar umstøður, hvussu nógv av okkara inntøku fer til húsarhald, og hvussu nøgd vit eru við okkara býli.*

*Í OECD londum eru býlisumstøðurnar sum heild góðar, kortini hava fólk í fleiri av londunum avmarkaða rúmd heima. Eisini hava flestu lond atgongd til grundleggjandi saniterar umstøður, so sum bað og wc. Generelt er galdandi fyri londini, at ein lutfalsliga stórur partur av inntøkuni fer til býli, og at støddin á inntøkuni er við til at gera av, hvussu býlið er.*

*Vánaligar býlisumstøður gera, at bæði kropsliga og sálarliga heilsan verður verri hjá fólki. Eisini kann tað føra til húsaófrið og vánalig úrslit hjá børnum í skúlanum. Grundleggjandi sosialur atburður verður ofta hóttur av vánaligum býlisumstøðum. So sum at aftra seg við at bjóða fólki innum. Eisini vísir gransking, at vánaligar býlisumstøður ávirka luttøkuna í fólkaræðinum og leiðir til lægri støði av sosialum kapitali.*

Samlaði indikatorurin fyri býlið verður fyri øll londini roknaður sum miðal av hesum trimum indikatorunum:

1. Atgongd til grundleggjandi saniter viðurskifti
2. Býliskostnaður
3. Rúm per persón

'Atgongd til grundleggjandi saniter viðurskifti' er ein spurningur um húski hava atgongd til vesi í húsinum. Her verður í Føroyum av Hagstovuni mett, at øll húski høvdu atgongd til vesi. Indikatorin 'Býliskostnaður' er ein uppgerð yvir, hvussu stóran part av inntøkuni verður nýttur til býlið. Her hevur ikki verði møguligt at finna tey tølini, tí tey tølini verða ikki gjørd upp í Føroyum á rættan hátt. Til seinast verður indikatorurin 'Rúm per persón' gjørdur upp sum tal av rúmum (t.e. stovur, køkur og sovirúm) dividerað við tal av fólkum í húskinum. Her varð gjørd ein spurnakanning til at finna hetta talið.

Fylgjandi myndirnar vísa úrslitini fyri omanfyri nevndu indikatorar, sum saman mynda indikatorin fyri býli. Mynd 2 vísir, at tað eru nøkur lond, har øll hava atgongd til vesi, og er talan um okkara grannalond. Av tí at Føroyar er hægst í hesum indikatori, fáa vit sostatt 10 fyri hendan indikatorin (saman við øðrum). Frymilin er í hesum føri: $10 - (0 - 0)(0 - 37)*10 = 10$.




*Mynd 2 – Prosent av húsum uttan vesi. Kelda: OECD og Hagstovan*

Mynd 3 vísir rúm per persón, og tað er uppgjørt við eini spurnarkanning frá heystinum 2021, sum Gallup hevur staðið fyri. Við rúm meinast ikki øll rúm, men bert kømur, stovur og køkar. Vit hava í Føroyum rættiliga nógv rúm per persón í mun til onnur lond.




*Mynd 3 – Rúm per persón. Kelda: OECD og Gallup*

Sum sæst á myndunum 2-3 omanfyri, so eru Føroyar væl fyri í býlisindikatorinum, sum vísir eitt miðaltal fyri býlisumstøðurnar hjá fólkum í OECD londunum.

Við at nýta frymil 1, so gevur frymilin Føroyum sum sagt 10 fyri fyrsta parameturin, tí vit hava lægsta talið í hesum parametrinum. Fyri rúm per persón, so skal frymil 1 nýtast til at rokna: (2,3 – 0,9) / (2,6 – 0,9) * 10 = 8,2 Hetta gevur miðaltalið (10+8,2)/2 = 9,1 fyri hendan indikatorin. Talið verður einans roknað út frá hesum báðum tølunum, tí vit hava ikki tøl fyri seinasta parameturin.

Á mynd 4 sæst samlaði indikator fyri býlið fyri øll OECD londini og Føroyar.




Mynd 4: Samlaður indikator fyri býlið. Kelda: OECD og egnar útrokningar.

Samlaða úrslitið leggur Føroyar á eitt fyrsta pláss innan býli, eins og í seinastu kanning. Hetta merkir, at í miðal hava føroyingar best býlisumstøður í OECD londunum, út frá hesum háttinum at gera upp uppá. Kortini ber tó til, at bólkar í føroyska samfelagnum ikki hava góðar býlisumstøður í og við, at hetta er eitt miðal tal. Eisini ber til at gera býlisumstøðurnar upp við øðrum hagtølum enn tey, sum eru nýtt her.

# Indikator 2 Inntøkur

*Hóast peningur ikki kann keypa eydnuna, so hevur peningur týdning fyri at fáa eitt hægri livistøði og størri vælveru. Hægri inntøka gevur eisini møguleika fyri betri býli, útbúgving og betri heilsuumstøðum.*

*Inntøka ger, at fólk kunnu nøkta sínar tørvir og fylgja mongum málum, sum hava nakað at siga fyri tey. Ríkidømi ger tað møguligt at viðlíkahalda hesi yvir tíð. Bæði inntøka og ríkidømi geva frælsi at velja livihátt. Kortini kann alt ikki keypast fyri pengar.*

*Inntøka og ríkidømi er vorðið størri seinastu 15 árini fyri flestu fólk í OECD londunum. Men samstundis sæst, at ríkidømi verður ójavnari býtt. Hetta merkir, at tørvur er á at hyggja eftir, um samfelagsbólkar í ov stóran mun verða hektaðir av vælferðini í samfelagnum, og um nýggir hættir at býta virðini eru neyðugir. Norðurlond eru kortini javnari samfeløg, sum tó hava merkt ein størri ójavna seinastu árini.*

Tað eru 2 parametrar fyri inntøku, hesir eru:

1. Inntøka pr. capita í PPP $
2. Ognir pr. capita

Vit hava ikki so góð hagtøl hesum viðvíkjandi í Føroyum. Fyri at fáa eitt tal fyri inntøku hava vit nýtt donsk tøl og mett, at føroysku tølini eru 14 % lægri enn tey donsku. Tað hevur verið kannað (í 2009), at vit hava prísir, sum eru 14% hægri enn í Danmark. Og eru okkara BTÚ tøl samanberilig við tey donsku, og vit hava sama gjaldoyra sum Danmark. Hinvegin er tBTI[2] (tøka bruttotjóðarinntøkan) eini 10% hægri í Føroyum enn í Danmark sambært Hagstovuni og Danmarks statistik (2017 tøl). Samlað er soleiðis mett, at tað føroyska talið fyri inntøkur er 4% lægri enn tað danska.

Í mynd 5 er metta talið fyri Føroyar víst. Vit síggja, at tað er fleiri lond har eingi tøl finnast fyri hetta hagtalið, og verða eisini gjørdar metingar fyri hini londini (t.d. Ísland) fyri hendan indikatorin.

---

[2] Munurin millum BTÚ og tBTI er, at í tí seinna verður blokkstuðul og inntøkur frá føroyingum arbeiðandi uttanlands tald við.




*Mynd 5 – Húsarhaldsinntøka per íbúgva í PPP $. Kelda: OECD og hava nýtt donsk tøl fyri Føroyar (86%)*

Samlað so vísir mynd 6 indikatorin fyri Føroyar og OCED londini. Her skal viðmerkjast, at vit ikki hava nakað tal fyri ognir og bert eina meting um inntøkur.




*Mynd 6 – Inntøku indikatorurin. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Samlaði indikatorurin er roknaður út frá talinum fyri inntøkur og við at nýta frymil 1 fáa vit: (28.422-16.275)/(45.284 - 16.275)*10 =4,2. Av tí einki tal er fyri ognir verður hetta talið fyri Føroyar fyri indikatorin inntøkur.

# Indikator 3 Arbeiði

*At hava eitt starv, sum hóskar til førleikar og væntanir, og sum gevur eina góða inntøku, er eitt universelt mál fyri fólk runt allan heimin. Búskaparvøksturin fram til fíggjarkreppuna gekk hond í hond við fleiri størv og meiri í løn til flestu fólk í OECD londum.*

*Definitiónin fyri "Hóskandi arbeiði" er hendan: "Møguleikar fyri kvinnur og menn at fáa hóskandi og framleiðsluskapandi arbeiði undir umstøðum við frælsi, javnrætti, tryggleika og menniskjansligari virðing" smb. ILO 2003*

*Fólk brúka nógva tíð til arbeiðis, og arbeiði hevur nógv at siga fyri tey. Arbeiðið er ofta tað, sum fólk geva aftur til samfelagið, og hetta gevur teimum virðing og stoltleika. Arbeiðið er tí grundleggjandi fyri tey.*

*Gransking vísir, at arbeiðsloysi hevur eina neiliga ávirkan á kropsliga og sálarliga heilsu og á subjektivt lívsnøgdsemi. Neiliga árinið av arbeiðsloysi er tí nógv breiðari enn bara mista inntøkan.*

Samlaði indikatorurin fyri arbeiði verður roknaður út frá 4 parametrum:

1. Ótryggleiki á arbeiðsmarknaðinum
2. Arbeiðsprosent
3. Langtíðararbeiðsloysi
4. Lønir

Vit hava ikki tøl fyri ótryggleika á arbeiðsmarknaðinum og heldur ikki fyri lønir. Fyri hinar báðar indikatorarnir hava vit funnið tøl fyri Føroyar. Fyrst er tað arbeiðsprosentið í mynd 7, sum er ein uppgerð av, hvussu stórur partur av fólkunum millum 15-64 ár eru til arbeiðis. Hagstovan hevur gjørt hesa kanning og vísir hon, at Føroyar hevur tað hægsta arbeiðsprosent í mun til onnur lond í OECD.




*Mynd 7 – Arbeiðsprosent (prosent av fólki í arbeiði millum 15-64 ár). Kelda: OECD og Hagstovan*

Næsti parameturin vit hava tøl fyri í Føroyum er langtíðararbeiðsloysi. Sambært Hagstovuni vóru tað í 2017 0,4 % av føroyingum, ið vóru arbeiðsleysir meira enn 1 ár, og er tað eitt tað lægsta prosentið millum OECD londini.




*Mynd 8 – Langtíðararbeiðsloysi (te. arbeiðsleys/ur meira eira enn eitt ár). Kelda: OECD og Hagstovan*

Sum sagt eru 4 parametrar fyri arbeiði, og vit í Føroyum hava tøl fyri 2 av hesum parametrum. Við hesum báðum parametrum eru vit samlað á einum 1. plássi í OECD rankingini, sum er hægri enn í seinastu kanning, tá vit vóru nr. 3[3]. Sí mynd 9:

[3] Í seinastu kanning í 2017 mettu vit eisini um lønir út frá donskum tølum, men tað verður ikki gjørt hesaferð vegna óvissuna.




*Mynd 9 – Samlaður indikator fyri arbeiði. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Samlaði indikatorurin er roknaður út frá hesum tveimum tølunum:

1. Arbeiðsprosenti (10)
2. Langtíðararbeiðsloysi (9,8)

Hetta gevur eitt miðaltal á 9,9. Sí mynd 9.

# Indikator 4 Sosial netverk

*Vit menniskju eru sosialir skapningar. Títtleikin vit eru saman við øðrum og góðskan av sosiala sambandinum hava nógv at siga fyri okkara vælveru. Fólk njóta at vera saman við øðrum, bæði familju, vinum og starvsfeløgum. Eisini njóta vit aktivitetir meiri, tá vit deila tað við onnur. Harafturat gevur sosiala netverki okkum stuðul, tá vit hava tørv á tí, og hjálpir okkum til dømis í sambandi við starvsmøguleikar og aðrar møguleikar.*

*Afturat tí frøi fólk fáa burtur úr at vera saman við hvørt øðrum geva sosial sambond fleiri aðrar ágóðar fyri persónliga og sosiala vælveru. Fólk, sum hava eitt víðkað og stuðlandi netverk, hava eina betri heilsu, tey liva ofta longur, og tey hava í størri mun eitt arbeiði. Á einum samfelagsligum støði geva sosial sambond nøkur virði. Hesi eru til dømis álit á onnur fólk, sum ávirkar nógv annað í samfelagnum. So sum búskaparvøkst, luttøku í fólkaræði, minni kriminalitet, betri heilsu og størri tollyndi. Indikatorarnir, sum verða brúktir í hesum kaptiuli, snúgva seg um, hvussu ofta vit eru saman við familju og vinum, og um vit kenna á okkum, at vit kunnu heita á onkran, um vit eru í neyð.*

*Sum heild eru persónlig, sosial netverk rættuliga sterk í OECD londunum, har flestu fólk síggjast við vinum og familju við jøvnum millumbilum. Eisini siga tey seg oftast hava onkran, tey kunnu heita á, um tey eru í neyð. Kortini eru sjónligir munir millum fólk, ymiskar samfelagsbólkar og demografiskar bólkar. Tey eldru, tey fátæku og tey við lægri útbúgvingum hava eitt lutfalsliga verri sosialt netverk, sigur OECD.*

*Eisini eru stórir munir á áliti millum fólk í ymisku OECD londunum. Hugtakið Sosialur Kapitalur snýr seg um, at sosial sambond – vinalag, familja og onnur sambond – geva samfelagnum ágóða, sum nevndir eru omanfyri. Sosialur kapitalur kann tí síggjast sum bæði eitt alment og privat gagn, sum hevur ágóða bæði fyri fólk og samfelag sum heild.*

Hesin samlaði indikator verður einans mátaður upp á spurningin um sosialt netverk, sum varð spurdur í kanningini hjá Fólkaheilsuráðnum umvegis Gallup, Gallup World Poll. Spurt varð, í hvønn mun fólk hava onkran, sum tey kunnu heita á, um tey hava tørv fyri tí. Sambært kanningini, so hava 97% av føroyingum onkran at heita á, og hetta talið  tað er sama sum í undanfarnu kanning.




*Mynd 10 – Netverk samlaður indikator. Kelda: OECD og Gallup*

Hesin indikatorurin verður sum sagt bert mátaður uppá hendan eina parameturin, og talið er fyri Føroyar 9,5, sum sæst í mynd 10. Orsøkin til at fleiri lond hava sama virði fyri hendan parameturin er at samlaða talið bert er roknað út frá einum tali, og tað talið liggur millum 88 og 98 í allar flestu førum.

# Indikator 5 Útbúgving

*Útbúgving er lykilin til ríkidømi hjá londum og einum betri lívi fyri fólk, sigur OECD. At menna førleikar er týdningarmikið fyri fólk, tí eitt av okkara mest grundleggjandi málum er at læra. Nógvir førleikar eru til, og allir hava týdning fyri at liva tað góða lívið. At megna og skilja heimin letur møguleikar upp fyri fólki og loyvir teimum í størri mun at stýra egnum lívi. Eisini ger útbúgving, at vit betur megna at njóta tað, sum lívið býður okkum. Til dømis eina góða bók ella eina listaframsýning.*

*Óbeinleiðis er útbúgving eisini við til at hækka okkara sosialu vælveru við, at vit við útbúgving fáa t.d. betri størv, betri løn og heilsubetri lívsstíl.*

*Fyri samfelagið merkir betri útbúgving størri produktivitet. Meiri nýskapan og politiskan stabilitet.*

*Útbúgving letur hurðar upp fyri fólki og gevur samfelagnum nógvar ágóðar, so sum hægri búskaparvøkst, sterkari sosiala tilvitan og minni av kriminaliteti. Við at gera íløgur í útbúgving kunnu bæði familjur og heil lond røkka nógvum sosialum og búskaparligum málum um somu tíð, sigur OECD.*

*Hesin kapittul nýtir nakrar væl grundaðar indikatorar fyri útbúgving, sum geva eina grundleggjandi mynd av verandi útbúgvingarstøðuni hjá vaksnum íbúgvum og ungum í einum modernaðum samfelagi. Fólk í OECD londum eru vorðin alt betur útbúgvin seinastu mongu árini, og eisini londini eru farin at líkjast hvørt øðrum meiri og meiri í útbúgvingarstøði. Kortini er munurin rættuliga stórur í PISA úrslitinum hjá ymisku londunum.*

*Hóast tað er ókeypis at ganga í skúla í mongum londum, so vísa tøl hjá OECD, at útbúgving og førleikar hjá lesandi enn er nógv ávirkað av inntøku og sosialari bakgrund, og at hetta fylgir fólki yvir tíð. Kanningarnar hjá OECD vísa, at longu fyrstu árini hjá barninum eru avgerandi fyri teirra framtíðar útbúgving og sostatt lív. Tí mælir OECD til, at børn frá illa støddum familjum longu fáa stuðul í skúlagongdini fyrstu árini. Hetta tí tey byrja sítt skúlalív, har tey eru aftanfyri tey meiri væl bjargaðu børnini.*

Fyri útbúgving verða hesir parametrar mátaðir fyri at rokna samlaða indikatorin út:

1. Hvussu stórur prosentpartur av fólkinum hevur eina miðnámsútbúgving?
2. Á hvørjum stigi er landið, tá tað kemur til PISA úrslit?
3. Hvussu nógv ár hava fólk tikið útbúgving í miðal?

Vit hava tøl fyri teir tveir fyrstu parametrarnar, men ikki tann síðsta. Sum sæst á myndunum á næstu síðu, so standa Føroyar seg ikki serliga væl í hesum báðum parametrum, har vit tó í fyrra parametri (mynd 11) viðvíkjandi fólki við miðnámsútbúgving, megna vit at liggja nærhendis OECD miðaltalinum.

Talið fyri fólkið við miðnámsútbúgving ella líknandi er fingið til vega við eini Gallup kanning á heysti 2021, ið spurdi um hetta.




Mynd 11 prosent av fólki við miðnámsskúla ella hægri. Kelda: OECD og Gallup

Mynd 12 vísir PISA úrslitini hjá Føroyum frá 2018, og her liggja vit sera aftarlaga á 7. aftasta plássi millum OECD londini




*Mynd 12 Miðal av pisa kanning í 2018 (stig í kanning). Kelda: OECD og Mentamálaráðið*




*Mynd 13 Útbúgving samlað. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Hetta er ein indikatorur, har Føroyar veruliga ikki megna at vera í toppinum av OECD londunum. Hetta hóast vit samstundis eru millum tey lond, sum lutfalsliga brúka mest pengar uppá útbúgving (kelda: Hagstovan). Vit hava hóast alt eina betran í hesum indikatori, av tí at vit nú hava eina ranking millum OECD lond sum nr. 21 land í røðini samanborið við nr. 28 í seinastu kanning.

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum:

1. Hvussu stórur prosentpartur av fólkinum hevur eina miðnámsútbúgving? (8,4)
2. Á hvørjum stigi er landið, tá tað kemur til PISA úrslit? (5,2)

Hetta gevur miðaltalið 6,8.

# Indikator 6 Umhvørvi

*Fólk eru nógv ávirkað av, hvussu heilsugott fysiska umhvørvið er at liva í. Árinið av dálking, vandamiklum evnum og larmi hava stóra ávirkan á heilsuna.*

*Umhvørvið hevur eisini ávirkan, tí flestu fólk seta prís uppá vakurleika, reinleika og eitt heilsugott umhvørvi, har tey búgva. Fólk hugsa eisini um, at jørðin verður niðurslitin og ovurnýtsluna av tilfeinginum í náttúruni, sigur OECD. At varðveita umhvørvi og náttúrunnar tilfeingi er eisini ein av størstu avbjóðingunum fyri burðardyggari vælveru yvir tíð. At hava atgongd til grøn øki gevur fólki møguleika fyri at njóta at vera saman við øðrum.*

*Hesin kapittul vísir, at í OECD londum er luftin vorðin nakað reinari seinastu árini, hóast fleiri lond enn hava ov stórar mongdir av partiklum. Fólk, sum búgva í stórum ídnaðarlondum, eru ofta í dálkaðari luft, samstundis sum tey ikki hava fría atgongd til reint drekkivatn og saniter viðurskifti.*

*Sum heild fyri heimin er tað galdandi, at fysiska umhvørvið er partur av 80% av øllum sjúkum í heiminum. Eisini kundi fjórðingur av allari sjúku, ella 13 milliónir av ov tíðliga deyðum, verið fyribyrgd við at betra um umhvørvið. Umhvørvispolitikkir spæla ein stóran leiklut í globalu heilsuni og tí góða lívinum hjá fólki.*

Indikatorin fyri umhvørvið verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Hvussu nøgd er fólk við vatngóðskuna, har tey búgva?
2. Hvussu rein er luftin, mátað eftir teimum heilt smáu partiklunum í luftini, sum kunnu ávirka heilsuna hjá fólki?

Fyrri parameturin verður mátaður við Gallup World Poll kanningini, har fólk eru spurd um, hvussu nøgd tey eru við vatngóðskuna í Føroyum. Seinni parameturin verður mátaður av eini mátistøð hjá Umhvørvisstovuni.

Á mynd 14 sæst, at føroyingar sum heild eru væl nøgdir við vatngóðskuna, og vit eru her á einum 5. plássi fyri hendan parametur, har serliga okkara grannalond eru frammanfyri okkum.




*Mynd 14 Prosent nøgd við vatngóðskuna. Kelda: OECD og Gallup*

Umhvørvisstovan hevur 2 ymiskar mátarar fyri luftgóðskuna, annar í miðbýnum í Havnini og hin í Havnardali. Vit hava her nýtt eitt miðaltal fyri mátaran, sum stendur í miðbýnum, eftirsum hetta skal mátast í urbanum umhvørvi. Umhvørvisstovan hevur tøl frá 2014 (hini londini hava fyri 2013 og trý ára miðal aftureftir). Okkara luftgóðska lá hetta árið á 6,4, men var ein ávís óvissa um hetta tal, og tað er minkað síðan til 4,9 í miðal árliga í 2016. Vit hava mett føroyska tal til 6 fyri 2013.




*Mynd 15 Partiklar í luftini ($PM_{2,5}$) í Tórshavn. Kelda: Umhvørvisstovan og OECD*




*Mynd 16 Umhvørvi samlað. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum:

1. Hvussu fólk eru nøgd við vatngóðskuna, har tey búgva (9,1)
2. Hvussu rein luftin er, mátað eftir teimum heilt smáu partiklunum í luftini, sum kunnu ávirka heilsuna hjá fólki (8,8)

Í miðal gevur tað 8,9.

# Indikator 7 Samfelagsluttøka

*Tað hevur týdning fyri vælveruna hjá fólki at vera við til at velja landsins stjórn og at vera ein partur av politikkinum í samfelagnum. Ein politisk rødd er ein av grundleggjandi frælsinum og rættinum, sum øll hava eina orsøk til at seta prís uppá. Eisini halda fólk, sum hava fingið møguleikan til at siga sína hugsan í eini avgerð, oftari at avgerðin er rættvís. Samfelagsluttøka kann eisini gera, at fólk betur eru før fyri at taka sær av sínum egna lívi. Harafturat ger samfelagsluttøkan, at fólk kenna, at tey hoyra til, tey kenna meiri álit, og tey kenna seg sosialt innkluderað.*

*Samfelagsluttøka gevur fólki eina rødd og loyvi til at vera ein partur av politikkinum í samfelagnum. Í vælvirkandi fólkaræðisligum samfeløgum er samfelagsluttøkan við til at skapa stovnar og stýra lívinum hjá fólkinum.*

*Indikatorarnir, sum eru valdir her, vísa kortini, at hóast øll fólk í OECD londunum hava møguleika fyri at gera sína rødd galdandi, so eru tað langt burtur frá, at øll gera tað. Serliga eru tað tey fátæku, tey minni útbúnu og tey ungu, sum ikki brúka sína rødd.*

*Eisini vísa indikatorarnir, at størri opinleiki og størri gjøgnumskygni als ikki eru við til at økja um áhugan fyri at gera sína rødd galdandi í samfelagnum. Heldur tvørtur ímóti.*

*Færri og færri av OECD borgarunum eru við til at velja landsins leiðslur.*

Indikatorin fyri samfelagsluttøku verður mátaður út frá tveimum ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Hvussu nógv valdu til seinasta val?
2. Hvussu verða hoyringspartar hoyrdir í sambandi við lógaruppskot?

Vit hava tøl fyri fyrra parameturin, men ikki tann seinna. Tann seinni parameturin skal gerast sum ein spurnaðar kanning millum embætisfólk, um hvussu partar verða hoyrdir, og hetta er ikki gjørt í Føroyum.

Mynd 19 vísir val luttøkuna við seinasta løgtingsval, sum sæst verða høg í mun til onnur lond.




*Mynd 17 Val luttøka við seinasta val. Kelda: OECD og kvf.fo/val*

Í mynd 18 verður talið fyri samlaða indikatorin ‘samfelagsluttøka’ víst.




*Mynd 18 Samfelagsluttøka samlað. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Vit liggja framvegis á einum fyrsta plássi viðvíkjandi samfelagsluttøku. Vit hava bara tøl fyri valluttøku, tí hin parameturin er ikki til fyri Føroyar. Tá tann parameturin ikki finst fyri Føroyar verður miðaltalið fyri Føroyar bert valluttøkan. Valluttøkan í Føroyum er serliga høg. Her liggja vit á einum 3. plássi í OECD, og rákið hevur við lítlari valluttøku ikki rakt Føroyar enn, eins og tað hevur rakt fleiri onnur OECD lond.

Miðal av hesum indikatori er roknað frá: Valluttøka (9,7).

# Indikator 8 Heilsa

*Lívslongd og fatanin av at liva eitt lív, uttan sjúku hava týdning fyri okkum øll. OECD sigur, at okkara heilsustøða er hon, sum hevur allar størsta týdning fyri okkum menniskju saman við tí at hava eitt starv.*

*Nógvir faktorar ávirka okkara heilsu. Okkara ílegur hava týdning. Rúsdrekka og royking. Yvirvekt. Høgt kolesterol. Eisini okkara møguleiki fyri at blíva við at hava eina góða heilsu.*

*WHO defineraði í 1948 heilsu soleiðis: "Heilsa er ein støða við fullkomnari kropsligari og sálarligari vælveru og ikki bara fráveran av eini sjúku". Hetta er heilsa í breiðastu merking, sum ávirkar allar aðrar síður av lívinum og ávirkar okkum øll.*

*At hava eina góða heilsu er eitt tað størsta virðið í lívinum hjá menniskjum. Eisini ávirkar heilsan møguleikan fyri at hava eitt arbeiði, fáa eina útbúgving, lívsnøgdsemi, vinna eina hóskandi inntøku og virkið at luttaka í sosialum virksemi av alskyns slagi. Kortini er tað torført at máta heilsustøðuna hjá fólki, tí hon fatar um so nógv. So sum lívslongd, nærveran av kroniskum sjúkum og bæði kropslig og sálarlig heilsa.*

*Í flestu londum í OECD væntast fólk at liva leingi og siga, at tey hava eina góða heilsu. Kortini hevur ein stórur partur av fólkinum kroniskar sjúkur ella eru avmarkað í sínum gerandisdegi orsakað av vánaligari heilsu. OECD sigur, at eldri fólk og kvinnur siga sína heilsustøðu vera ónøktandi og sama við samfelagsbólkum við lægri inntøkum.*

Indikatorin fyri heilsu verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Væntaður livialdur frá føðing í Føroyum fyri bæði kyn samlað
2. Sjálvmett heilsa

Her hava vit tøl fyri báðar parametrarnar. Væntaður livialdur verður roknaður út á Hagstovuni, meðan sjálvsmett heilsa fáa vit frá Gallup world poll kanningini.

Mynd 19 vísir miðal livialdurin í Føroyum og sæst, at hann er millum teir hægstu millum OECD londini.




*Mynd 19 Væntaður livialdur. Kelda: OECD og Hagstovan*

Í mynd 20 hava vit eisini tøl fyri sjálvsmettari heilsu, sum er fingin til vega frá Gallup World Poll kanningini.




*Mynd 20 Sjálvmett heilsa. Kelda: OECD og Gallup*

Hetta gevur ein samlaðan indikator fyri heilsu, sum víst í mynd 21




*Mynd 21 Samlaður indikator fyri heilsu. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum við at taka miðal:

1. Væntaður livialdur frá føðing í Føroyum fyri bæði kyn samlað (9,6)
2. Sjálvmett heilsa (8,7)

Í miðal gevur tað 9,2.

# Indikator 9 Lívsnøgdsemi

*Orð sum eydna og vælferð hava leingi verið nýtt sum heiti fyri tað góða lívið. Bert fyri fáum árum síðani var ikki gjørligt at máta vælveruna hjá fólki. Kortini eru tað seinastu árini komin standardiserað mát fyri hesum, har fólk sjálvi verða spurd, hvussu tey meta sítt lív. Kanningar vísa, at fólk hava lætt við at taka støðu til subjektivt lívsnøgdsemi og svara skjótari og oftari upp á hendan spurning, heldur enn ein meiri objektivar spurningar, so sum teirra inntøku.*

*Kanningar vísa eisini, at subjektivir lívsnøgsemisspurningar verða fataðir eins í ymiskum mentanum. Eisini vísa kanningar, at samanhangur er millum subjektivu vælveruna, og í hvønn mun fólk útrykkja jaligar kenslur, so sum smíl.*

*Subjektivt lívsnøgdsemi snýr seg um, hvussu fólk sjálvi uppliva umstøðurnar í sínum lívi. Kapittulin setur sum treyt, at fólk sjálvi eru bestu dómarar fyri, hvussu teirra egna lív gongur.*

*Høvuðsspurningurin í hesum kapitli biður fólk evaluera sítt lív sum eina heild, og spyr eisini inn til nakrar kenslur tey uppliva. Bæði jaligar og neiligar. Sum heild kann sigast, at fyri OECD lond, so er subjektiva lívsnøgdsemi og harvið vælveran millum fólk rættuliga gott.*

*Kortini er tað galdandi fyri nøkur av londunum, at teirra lívsnøgdsemi er líka lágt sum fyri láginntøkubólkar í øðrum londum ella sum fyri fólk í menningarlondum. Meðal lívsnøgdsemi er vaksið við tíðini í fleiri londum og í øðrum londum er tað stagnerað.*

*Upplýsingar til hendan part eru úr Gallup World Poll, sum er ein óalmenn kelda. OECD nýtir hesa keldu, men heldur kortini, at kanningin er grundað á eitt ov lítið datatilfar úr ymisku londunum.*

Hesin parametur verður einans roknaður út út frá spurninginum um lívsnøgsemi:

- Á einum stiga frá 0-10, har 0 er ringasta lívið fyri teg og 10 er best møguliga lívið fyri teg, hvar á stiganum ert tú í dag?

Føroyar hava hvørja ferð kanningin er gjørd ligið omanfyri hini londini, tá spurt hevur verið hendan spurningin. Vit kunnu siga, at hann er rættiliga subjektivur skilt á tann hátt, at tú nýtist ikki hava eitt gott lív fyri tað um tú heldur tað, men hetta er so sami spurningur, sum er settur í øllum OECD londunum.

Í mynd 22 er samlaða indikatorurin vístur.




*Mynd 22 Samlaður indikator fyri nøgdsemi. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Sum sagt so skal bert tann eini parameturin til at rokna hendan indikatorin.

# Indikator 10 Tryggleiki

*Persónligur tryggleiki er eitt breitt hugtak, sum m.a. fevnir um kríggj, etniskar konfliktir, terror, náttúruvanlukkur, umhvørvisvanlukkur og kriminalitet. Nakrar av hesum hendingum henda sera sjáldan og aðrar oftari. Hesin kapittul fevnir einans um kriminalitet, tí kriminalitetur er mest vanligi tryggleikafaktorurin, sum ávirkar flest fólk. Kriminalitetur hevur eisini ávirkan á tey, sum ikki eru offur. Hetta tí, at onnur eisini fáa eina kenslu av ótryggleika, tá ein kriminell hending hevur verið. Tí hevur tað eisini stóran týdning, at fólk sjálvi kenna seg trygg.*

*Persónligur tryggleiki hevur nógv at siga fyri vælveruna hjá fólki. Nógv ymiskt ávirkar tryggleikakensluna, so sum kriminalitetur er mest vanligi indikatorin. Kriminalitetur kann føra til morð, kropsliga pínu, at fáa ognir stolnar, postraumatiska strongd og angist. At liva í einum tryggum umhvørvi hevur tískil týdning fyri fólk, og harafturat kenslan av ótryggleika avmarkar fólk í gerandisdegnum.*

*Í flestu OECD londum siga fólk, at tey kenna seg trygg, tá tey ganga í sínum grannalagi um kvøldið. Hetta tal er tó lægri fyri teir heilt stóru búskapirnar.*

Indikatorin fyri tryggleika verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Er tað trygt at ferðast úti?
2. Hvussu nógv morð eru hend pr. 100 túsund fólk?

Vit hava tøl fyri báðar hesar parametrarnar. Um tað er trygt at ferðast úti er spurt um í Gallup world poll kanningini, og landslæknin hevur tøl fyri morð í Føroyum. Í mynd 23 sæst at 96% av fólkunum í Føroyum halda tað er trygt at ferðast úti í Føroyum:




*Mynd 23 Er tað trygt at ferðast úti? Kelda: OECD og Gallup*

Mynd 24 vísir, at morðratan er 0 í Føroyum (talið er frá 2015)




*Mynd 24 Morðrata pr. 100 túsund. Kelda: OECD og Ársfrágreiðing frá Landslæknanum.*

Í mynd 25 verður víst samlaður indikator fyri tryggleika.




*Mynd 25: Samlaður indikator fyri tryggleika. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum:

1. Hvussu trygt heldur tú tað verða at ferðast úti? (10)
2. Hvussu nógv morð eru hend pr. 100 túsund fólk? (10)

Í miðal gevur tað 10.

# Indikator 11 Arbeiði og frítíð javnvág

*Tað at finna ein javnvág millum arbeiði og frítíð er ein avbjóðing, sum øll sum arbeiða kenna. Familjur er serliga ávirkaðar. Tað at kunna sameina arbeiði og familju er týdningarmikið fyri samlaðu vælferðina hjá øllum í familjuni. Tað almenna kann gera hesa javnvágina betri við at hava fleksibul arbeiðspláss, og soleiðis gera tað lættari hjá foreldrum at fáa eina betri javnvág millum arbeiði og frítíð.*

*Ein máti at máta hetta er við at hyggja at, hvussu nógv arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna og sostatt ikki hava so nógva tíð til familjuna. Í miðal so arbeiðir 11% í OECD londunum meira enn 50 tímar um vikuna. Ein annar háttur er at máta, hvussu nógva tíð vit nýta til frítíð. Hetta kann vera røkt, sum er eting og sova o.s.fr. og frítíð, sum er frítíðarítriv, sjónvarp, vera saman við familjuni o.s.fr. Í miðal í OECD nýta fólk við fulltíðarstarvi umleið 15 tímar um dagin uppá røkt og frítíð.*

Indikatorin fyri arbeiði og frítíð javnvág verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Hvussu nógv arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna?
2. Hvussu nógva tíð verður nýtt til røkt og frítíð?

Vit hava bert tøl fyri fyrra av hesum parametrunum. Vit hava fingið nýggj hagtøl frá Hagstovuni um fólk arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna. Vit hava ikki spurt, hvussu nógva tíð tað verður nýtt til røkt og frítíð, tí at hetta verður í øðrum londum gjørt út frá eini kanning við tíma skráseting.

Mynd 26 vísir at tað eru nógv í Føroyum, sum arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna. Talið er frá eini spurnarkanning Hagstovan gjørdi á heystið 2021, har spurt varð um, hvussu nógvar tímar viðkomandi hevði arbeitt síðstu vikuna. Hetta talið skal takast við einum ávísum fyrivarni, tí hetta er ikki gjørt upp fyrr, og tí vita vit ikki um hetta er eitt tal vit kunnu lýta á.




*Mynd 26: Hvussu nógv arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna. Kelda: OECD og Gallup.*

Mynd 27 vísir samlaða indikatorin fyri Arbeiði/frítíð javnvágina:




*Mynd 27: Samlaður indikator fyri arbeiði/frítíð javnvág. Kelda: OECD og egnar útrokningar.*

Hesin indikatorur er bert roknaður frá parametrum um, hvussu nógv arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna.

# Samanhangir

Fyri at vita um tað eru nakrir samanhangir millum indikatorarnar fyri londini eru gjørdar nakrar korrelatiónir, sum skulu vísa hvørjir samanhangir eru ímillum ymisku indikatorarnar. Í fylgiskjalinum eru allar korrelatiónirnar vístar. Tað sæst, at tað eru summir indikatorar, sum hava betri korrelatión enn aðrir.

Serliga sæst, at arbeiði hevur bestu korrelatión við nøgdsemi. Sostatt er helst samanhangur millum, hvussu arbeiðsmarknaðurin virkar (t.d. hvussu nógv fólk eru langtíðararbeiðsleys og hvussu nógv fólk arbeiða) og hvussu lukkulig fólk eru. $R^2$ er eitt tal, sum skal vísa hetta og er tað her 0,58, sum er rættiliga høgt í hesum sambandi ($R^2$ má liggja ímillum 0 og 1, og tættari 1 talið tess betur er samanhangurin). Í mynd 28 er samanhangurin vístir sum ein grafur.

Viðmerkjast skal at londini, sum ikki eru í OECD: Russland, Brasilia og Suður Afrika eru ikki við í hesum grafunum og talvuni í fylgiskjalinum.




Mynd 28 Korrelatión millum arbeiði og lívsnøgdsemi. Kelda: OECD og egnar útrokningar

Ein onnur høg korrelatión er millum heilsu og lívsnøgdsemi, Her er $R^2$ 0,51, sum eisini týðir uppá ein góðan samanhang. Hetta kann týða uppá, at góð heilsa er ein góður parametur fyri at siga nakað um lívsnøgdsemi.




Mynd 29 Korrelatión millum heilsu og lívsnøgdsemi. Kelda: OECD og egnar útrokningar

Til seinast er eisini roynd ein korrelatión millum nøgdsemi og inntøku. Her er ikki so góður samanhangur, sum kanska sigur nakað um at pengar eru ikki alt. Her er $R^2$ einans 0,31.




Mynd 30 Korrelatión millum inntøku og lívsnøgdsemi. Kelda: OECD og egnar útrokningar

Allir $R^2$ samanhangirnir við nøgdsemi eru vístir í talvu 3 (sí fylgiskjal):

| Indikator vs. | Nøgdsemi |
|---|---|
| Býli | 0,10 |
| Inntøka | 0,34 |
| Arbeiði | 0,58 |
| Netverk | 0,45 |
| Útbúgving | 0,13 |
| Umhvørvi | 0,24 |
| Samfelagluttøka | 0,22 |
| Heilsa | 0,51 |
| Nøgdsemi | - |
| Tryggleiki | 0,18 |
| Arbeiðslívfrítíð | 0,04 |

Talva 3. $R^2$ Samanhangur millum nøgdsemi og hinar indikatorarnar. Kelda: OECD og egnar útrokningar

Vit síggja, at indikatorarnir arbeiði, heilsa og netverk eru tey, sum hava størst týdning fyri nøgdsemi, meðan býli, útbúgving, tryggleiki og serliga arbeiðslív/frítíð javnvág ikki hevur tann stóra týdningin.

Víðari frá fylgiskjalinum kunnu vit gera talvu 4, ið er ein greining av, hvør indikator hevur mest at siga fyri miðal fyri allar indikatorarnar.

| Indikator vs. | Miðal |
|---|---|
| Býli | 0,39 |
| Inntøka | 0,52 |
| Arbeiði | 0,58 |
| Netverk | 0,69 |
| Útbúgving | 0,38 |
| Umhvørvi | 0,39 |
| Samfelagluttøka | 0,30 |
| Heilsa | 0,48 |
| Nøgdsemi | 0,66 |
| Tryggleiki | 0,57 |
| Arbeiðslívfrítíð | 0,18 |

Talva 4. $R^2$ Samanhangur millum miðal og indikatorarnar. Kelda: OECD og egnar útrokningar

Her sæst, at tað, sum hevur mest at siga fyri miðal er netverk, nøgdsemi og arbeiði. Hinvegin hava Arbeiðslív/frítíð javnvág, samfelagsluttøka og útbúgving ikki so nógv at siga.

Tað eru íalt 66 samanhangir, sum kunnu gerast millum indikatorarnar og miðal (11·12 / 2, sí fylgiskjal) og eru her bert vístir nakrir av hesum fyri at geva eina mynd av, hvussu hesi tølini kunnu greinast víðari.

# Fylgiskjal

Samlað talva fyri indikatorarnar og korrelatiónirnar:

| | Býli | Inntøka | Arbeiði | Netverk | Útbúgving | Umhvørvi | Samfelagl | Heilsan | Nøgdsemi | Tryggleiki | Arbeiðslívf | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Australia | 5,5 | 5,4 | 7,7 | 8,5 | 8,6 | 8,9 | 8,8 | 9,4 | 8,1 | 7,1 | 4,0 | 7,4 |
| Austria | 6,1 | 4,7 | 7,8 | 7,0 | 6,6 | 6,6 | 4,0 | 7,9 | 7,5 | 8,6 | 5,4 | 6,6 |
| Belgium | 7,2 | 4,7 | 7,2 | 6,5 | 7,5 | 5,9 | 6,8 | 8,2 | 6,9 | 7,7 | 7,8 | 6,9 |
| Canada | 7,9 | 5,0 | 7,6 | 7,5 | 7,9 | 8,3 | 6,6 | 9,6 | 8,4 | 8,6 | 5,8 | 7,6 |
| Chile | 5,5 | 0,4 | 4,1 | 3,5 | 4,4 | 4,2 | 0,3 | 6,4 | 5,6 | 5,2 | 7,1 | 4,2 |
| Colombia | 4,5 | 0,4 | 7,5 | 5,5 | 1,3 | 5,9 | 1,2 | 7,0 | 5,0 | 1,1 | 1,9 | 3,8 |
| Czech Rep | 4,9 | 1,8 | 6,0 | 6,5 | 7,6 | 5,2 | 2,6 | 6,5 | 6,3 | 7,9 | 8,3 | 5,8 |
| Denmark | 6,2 | 2,6 | 8,0 | 8,5 | 7,9 | 8,3 | 6,4 | 7,9 | 9,1 | 8,9 | 8,5 | 7,5 |
| Estonia | 6,8 | 1,2 | 5,7 | 7,0 | 8,0 | 7,3 | 5,7 | 5,6 | 3,1 | 7,2 | 6,7 | 5,8 |
| Føroyar | 9,1 | 3,2 | 9,9 | 9,5 | 6,8 | 8,9 | 9,7 | 9,2 | 10,0 | 10,0 | 8,6 | 8,6 |
| Finland | 6,2 | 3,3 | 7,1 | 8,5 | 8,9 | 8,9 | 4,8 | 7,9 | 9,1 | 8,9 | 7,0 | 7,3 |
| France | 6,6 | 4,1 | 6,4 | 6,0 | 6,1 | 6,0 | 5,4 | 7,7 | 5,6 | 7,8 | 8,6 | 6,4 |
| Germany | 6,9 | 4,5 | 7,8 | 6,0 | 7,7 | 6,9 | 4,8 | 7,3 | 7,2 | 8,0 | 7,8 | 6,8 |
| Greece | 4,8 | 0,8 | 1,5 | 1,0 | 6,0 | 3,6 | 3,4 | 8,2 | 2,2 | 6,9 | 8,1 | 4,2 |
| Hungary | 5,6 | 0,5 | 5,3 | 4,0 | 5,8 | 4,3 | 2,6 | 6,0 | 2,8 | 6,5 | 9,1 | 4,8 |
| Iceland | 5,3 | 5,9 | 9,8 | 10,0 | 6,8 | 10,0 | 5,9 | 8,6 | 8,8 | 9,1 | 5,4 | 7,8 |
| Ireland | 7,4 | 2,6 | 6,9 | 8,5 | 7,4 | 7,6 | 2,3 | 9,1 | 7,2 | 8,2 | 8,4 | 6,9 |
| Israel | 1,8 | 3,2 | 6,5 | 5,0 | 5,6 | 2,8 | 6,1 | 9,3 | 7,8 | 7,5 | 5,3 | 5,5 |
| Italy | 5,2 | 3,3 | 4,9 | 7,0 | 4,8 | 3,8 | 6,2 | 8,3 | 4,1 | 6,8 | 9,4 | 5,8 |
| Japan | 5,9 | 4,0 | 7,4 | 5,5 | 6,7 | 6,4 | 1,2 | 5,3 | 3,8 | 8,0 | 0,0 | 4,9 |
| Korea | 7,6 | 2,5 | 6,6 | 0,0 | 7,6 | 2,4 | 7,7 | 4,7 | 3,8 | 7,4 | 3,3 | 4,9 |
| Latvia | 3,6 | 0,0 | 4,9 | 4,0 | 7,1 | 6,1 | 3,9 | 4,5 | 3,8 | 6,3 | 4,8 | 4,5 |
| Lithuania | 5,4 | 1,9 | 4,6 | 5,0 | 7,3 | 5,8 | 3,5 | 4,2 | 3,8 | 6,0 | 9,9 | 5,2 |
| Luxembou | 6,8 | 9,0 | 8,7 | 7,5 | 5,0 | 6,5 | 6,3 | 8,0 | 6,9 | 8,2 | 8,9 | 7,4 |
| Mexico | 3,1 | 0,6 | 4,5 | 1,5 | 1,1 | 3,9 | 6,8 | 6,4 | 5,6 | 2,1 | 1,2 | 3,3 |
| Netherland | 7,4 | 2,9 | 8,1 | 6,5 | 7,4 | 7,1 | 7,5 | 8,4 | 8,4 | 8,7 | 9,9 | 7,5 |
| New Zeala | 4,4 | 4,6 | 7,3 | 9,0 | 6,9 | 8,5 | 7,0 | 9,5 | 8,1 | 7,2 | 4,7 | 7,0 |
| Norway | 8,4 | 4,5 | 7,9 | 8,0 | 7,4 | 9,5 | 6,0 | 8,7 | 9,1 | 9,4 | 7,8 | 7,9 |
| Poland | 4,7 | 1,6 | 5,5 | 4,0 | 7,6 | 4,3 | 4,4 | 6,1 | 4,4 | 7,5 | 5,2 | 5,0 |
| Portugal | 6,3 | 2,0 | 4,8 | 5,0 | 4,5 | 7,1 | 1,8 | 5,8 | 2,2 | 7,9 | 7,5 | 5,0 |
| Slovak Rep | 4,5 | 1,1 | 4,6 | 6,5 | 5,7 | 4,8 | 6,0 | 6,7 | 4,7 | 7,2 | 8,8 | 5,5 |
| Slovenia | 6,9 | 1,7 | 6,1 | 7,0 | 7,8 | 6,4 | 3,9 | 7,3 | 3,8 | 9,1 | 6,1 | 6,0 |
| Spain | 6,8 | 3,5 | 4,3 | 7,5 | 5,5 | 6,5 | 4,1 | 8,4 | 5,0 | 8,7 | 8,4 | 6,2 |
| Sweden | 7,0 | 5,2 | 7,5 | 6,5 | 7,7 | 4,7 | 6,4 | 8,5 | 8,1 | 8,1 | 7,4 | 7,0 |
| Switzerlan | 6,5 | 7,3 | 9,3 | 7,5 | 7,4 | 3,1 | 3,0 | 9,0 | 8,8 | 9,0 | 9,9 | 7,3 |
| Turkey | 4,6 | 1,6 | 5,5 | 4,0 | 2,8 | 5,5 | 5,2 | 7,1 | 2,5 | 6,7 | 1,8 | 4,3 |
| United King | 5,3 | 5,6 | 7,4 | 8,0 | 6,8 | 5,1 | 7,3 | 7,7 | 6,6 | 8,4 | 5,2 | 6,7 |
| United Sta | 8,4 | 9,0 | 8,5 | 6,5 | 7,0 | 5,4 | 6,8 | 9,0 | 6,9 | 7,1 | 4,5 | 7,2 |
| OECD - To | 6,5 | 5,4 | 6,8 | 5,5 | 6,1 | 4,8 | 5,4 | 7,5 | 5,6 | 7,0 | 5,5 | 6,0 |

**Korrelatiónir $R^2$**

| | Býli | Inntøka | Arbeiði | Netverk | Útbúgving | Umhvørvi | Samfelagl | Heilsan | Nøgdsemi | Tryggleiki | Arbeiðslívf | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Býli | - | 0,19 | 0,22 | 0,12 | 0,20 | 0,15 | 0,05 | 0,06 | 0,10 | **0,30** | 0,11 | 0,39 |
| Inntøka | 0,19 | - | **0,48** | 0,26 | 0,10 | 0,04 | 0,16 | 0,33 | 0,31 | 0,21 | 0,01 | 0,50 |
| Arbeiði | 0,22 | **0,48** | - | 0,43 | 0,11 | 0,23 | 0,16 | 0,23 | **0,58** | 0,18 | 0,00 | 0,58 |
| Netverk | 0,12 | 0,26 | 0,43 | - | 0,17 | **0,53** | 0,08 | 0,37 | 0,45 | 0,31 | 0,09 | 0,69 |
| Útbúgving | 0,20 | 0,10 | 0,11 | 0,17 | - | 0,12 | 0,07 | 0,03 | 0,14 | **0,52** | 0,12 | 0,40 |
| Umhvørvi | 0,15 | 0,04 | 0,23 | **0,53** | 0,12 | - | 0,05 | 0,11 | **0,24** | 0,16 | 0,00 | 0,39 |
| Samfelagl | 0,05 | 0,16 | 0,16 | 0,08 | 0,07 | 0,05 | - | 0,19 | **0,22** | 0,08 | 0,00 | 0,30 |
| Heilsan | 0,06 | 0,33 | 0,23 | 0,37 | 0,03 | 0,11 | 0,19 | - | **0,51** | 0,15 | 0,04 | 0,48 |
| Nøgdsemi | 0,10 | 0,31 | **0,58** | 0,45 | 0,14 | **0,24** | **0,22** | **0,51** | - | 0,18 | 0,04 | 0,66 |
| Tryggleiki | **0,30** | 0,21 | 0,18 | 0,31 | **0,52** | 0,16 | 0,08 | 0,15 | 0,18 | - | 0,20 | 0,57 |
| Arbeiðslívf | 0,11 | 0,01 | 0,00 | 0,09 | 0,12 | 0,00 | 0,00 | 0,04 | 0,04 | 0,20 | - | 0,18 |
| Miðal | 0,39 | 0,50 | 0,58 | 0,69 | 0,40 | 0,39 | 0,30 | 0,48 | 0,66 | 0,57 | 0,18 | - |

**Spurningar/hagtøl og keldur fyri Føroyar**

| Indikatorar og parametrar | Kelda | Hagtal |
|---|---|---|
| **Indikator 1 Býli** | | **9,1** |
| 1. (Ikki) atgongd til grundleggjandi saniter viðurskifti | Hagstovan | 0 |
| 2. Býliskostnaður | Ikki tøkt | - |
| 3. Rúm per persón | Gallup kanning | 2,3 |
| **Indikator 2 Inntøka** | | **4,2** |
| 4. Inntøka pr. capita í PPP $ | Meting/Hagstovan | 28422 |
| 5. Ognir pr. capita | Ikki tøkt | - |
| **Indikator 3 Arbeiði** | | **9,9** |
| 6. Ótryggleiki á arbeiðsmarknaðinum | Ikki tøkt | - |
| 7. Arbeiðsprosent | Hagstovan | 86,6 |
| 8. Langtíðararbeiðsloysi | Hagstovan | 0,4 |
| 9. Lønir | Ikki tøkt | - |
| **Indikator 4 Netverk** | | **9,5** |
| 10. Hava onkran, sum tey kunnu heita á? | Gallup World Poll | 97 |
| **Indikator 5 Útbúgving** | | **6,3** |
| 11. Prosentpartur av fólkinum við miðnámsútbúgving | Gallup kanning | 85 |
| 12. Á hvørjum stigi er landið, tá tað kemur til PISA úrslit? | Mentamálaráðið | 466 |
| 13. Hvussu nógv ár hava fólk tikið útbúgving í miðal? | Ikki tøkt | - |
| **Indikator 6 Umhvørvi** | | **8,9** |
| 14. Hvussu fólk eru nøgd við vatngóðskuna, har tey búgva? | Gallup World Poll | 95 |
| 15. Hvussu rein er luftin? | Umhvørvisstovan | 6 |
| **Indikator 7 Samfelagsluttøka** | | **9,7** |
| 16. Hvussu nógv valdu til seinasta val? | Kvf.fo/val | 89,8 |
| 17. Hoyringspartar hoyrdir í samband við lógaruppskot? | Ikki tøkt | - |
| **Indikator 8 Heilsa** | | **9,2** |
| 18. Væntaður livialdur frá føðing í Føroyum | Hagstovan | 83,1 |
| 19. Sjálvmett heilsa | Gallup World Poll | 81 |
| **Indikator 9 Nøgdsemi** | | **10** |
| 20. Hvussu nøgd/ur er tú við lívið í dag? | Gallup World Poll | 7,9 |
| **Indikator 10 Tryggleiki** | | **10** |
| 21. Er tað trygt at ferðast úti? | Gallup World Poll | 96 |
| 22. Hvussu nógv morð eru hend pr. 100 túsund fólk? | Landslæknin | 0 |
| **Indikator 11 Arbeiðslív/frítíð javnvág** | | **8,6** |
| 23. Hvussu nógv arbeiða meira enn 50 tímar um vikuna? | Gallup kanning | 4,7 |
| 24. Hvussu nógva tíð verður nýtt til røkt og frítíð? | Ikki tøkt | - |
| **Miðal fyri allar indikatorarnar** | | **8,7** |